# Skeið fyri sangskrivarar í Føroyum

**Nú fáa føroyskir sangskrivarar høvið at læra, hvussu ein fær selt egin løg til stórar stjørnur sum Celine Dion og Westlife. Í hesi vikuni verður nevniliga skeið fyri sangskrivarar í Norðurlandahúsinum, og ein av skeiðsfyriskiparunum hevur júst skrivað tónleik til bæði Celine Dion og Westlife.**

SANGSKRIVING
*Tíðindaskriv*

Tað verða nakrir av royndastu sangskrivarunum í Føroyum, sum nú hósdagin 21. og fríggjadagin 22. apríl fara at seta seg á skúlabonkin at lurta eftir Jan Lysdahl og Lisbeth Rysgaard frá KODA, sum bæði hava drúgvar royndir í at skriva sangtekstir og løg fyri onnur. Á skeiðnum fáa føroysku luttakarirnir høvið at spæla løg, teir sjálvir hava skrivað, og hoyra, hvat skeiðsfyriskiparirnir halda um møguleikarnar fyri at selja hesi løgini til onnur at framføra. Harafturat fáa luttakarirnir eisini innlit í, hvørja hjálp teir kunnu fáa frá einum forlagi sum KODA í hesum sambandi.

Teir báðir skeiðsfyriskiparirnir, Jan Lysdahl og Lisbeth Rysgaard, hava skrivað sangtekstir og løg fyri onnur í nógv ár. Jan Lysdahl er, umframt at vera tónaskald og sangskrivari, eisini framleiðari og útsetari.

Sum tónaskald hevur hann millum annað gjørt tilfar til Carolu, James Sampson, Creamy, Joof & Frödin og Alih Jey. Harumframt hevur hann saman við Pelle Nylén gjørt tónleik til Westlife, og saman Andreas Carlsson til Celine Dion. Eitt av hansara kendastu løgum er "Hammerfedt" og hann hevur í løtuni eitt lag, sum liggur nummar 1 á hitt-listanum í Japan. Lisbeth Rysgaard skrivaði ein sáttmála við plátufelagið BMG í 1999, og hevur síðani skrivað løg fyri tónleikarar, sum eru knýttir at tí felagnum. Í 2002 stovnaði hon saman við øðrum plátufelagið Puff Music ApS. Harumframt er Lisbeth Rysgaard sangarinna og sangskrivari í bólkinum Falden Rysgaard, og hevur millum annað útgivið fløgurnar "Short Stories" við Falden Rysgaard og "Poppe Popcorn" við Magnus og Myggen. Hon skrivar eisini tekstir og løg til lýsingar.

Skeiðið í Norðurlandahúsinum er fullteknað, og pláss er tí ikki fyri fleiri luttakarum á skeiðnum.



# Skotin í ryggin við maskinbyrsu

**Hóskvøldið klokkan 18.40 gjørdist Pusher Street á Christiania eitt kríggsøki. Ein flokkur av ungum monnum komu inn á Christiania vápnaðir við maskinbyrsum og øðrum skotvápnum og skutu rundan um seg. Ein 26 ára gamal christianitti doyði av skotunum, og fimm onnur vórðu særd**

CHRISTIANIA
*Niels Uni Dam*

Tey særdu eru øll uttan fyri lívsvanda, tvey vórðu ikki innløgd, tvey eru aftur útskrivað, meðan ein enn er innlagdur.

Aftan á at hava skotið rýmdu drápsmennirnir í tveimum bólkum. Nakrir teirra rændu ein bil uttan fyri frístaðin, meðan hinir rýmdu í egnum bili. Báðir bilarnir eru seinni funnir, og eigarin av tí eina bilinum, ein 25 ára gamal maður, er sambært Ekstrablaðnum handtikin. Hann er skuldsettur fyri morð, morðroynd og fyri at hava luttikið í skotbardaganum. Løgreglan sigur, at enn er ógreitt hvønn leiklut maðurin hevur havt, og tí verður ákæran so umfevnandi.

### Hevndaratsókn

Løgreglan metur, at orsøkin til skotbardagan kann hava okkurt at gera við hassjhandilin. Men heldur, at sannlíkt er, at talan er um eina hevndaratsókn, fyri okkurt rok, sum var dagin fyri á Christiania.

Ein flokkur av christianittum komu hóskvøldið við einari áheitan á hassjkundar um ikki at keypa hassj á Christiania longur, tí tey ikki vilja búgva í einum krígsøki.

### Karmarnir knústir

Í tíðindunum á TV2 fanst ein christianitti hvassliga at politikarunum, sum hava knúst føstu karmarnar, sum hassjhandilin á Christiania hevði. Skipaði handilin hevði sera greiðar reglur, eingi vápn og eingi hørð rúsevnir.

Hetta er alt broytt aftan á at hassjsølan er flutt í hassjklubbar kring býin. Umhvørvið er vorðið nógv harðari. Christianittin ynskti løggevandi valdinum tillukku við fyri við valdi at hava skapt kríggj.

Minningarhald varð hildið fríggjakvøldið fyri tann deyða. Tá funnust eisini prestarnir Lene Mathies og Flemming Pless at avgerðini at taka burtur hassjsølubúðirnar á Christiania. Hassjsølubúðirnar vórðu tiknar burtur fyri einum ári síðan.

Lene Mathies segði sambært Ekstra Blaðnum, at hassjhandilin plagdi at vera undir skipaðum viðurskiftum, men nú varð hann stýrdur av kreftum, sum nú høvdu víst sítt ónda, ónda andlit.

# Frá filétfabrikk til idéfabrikk

Soleiðis ljóðar herrópið á heimasíðuni hjá Reproz, og ja, Reproz hevur flutt seg frá at bara vera ein grafisk fyritøka, til at verða eitt av teimum størstu samskiftishúsunum í Føroyum. Fyritøkan bjóðar m.a. heildarloysnir innan kunningarvirksemið, sniðhondbøkur, størri og minnið lýsingar- og kunningarherferðir, og ja, eisini grafisk arbeiði og uppseting av bókum.

Hósdagin bjóðaði Reproz áhugaðum virkjum og einstaklingum á kunningarfund um heimasíðuskipanina, sum tey umboða. Skipanin Dynamic Web, er føroyska av Reproz. Tey hava umboða skipanina í eitt sindur longur enn eitt ár. Tey hava longu gjørt heimasíðir til fleiri virkir og feløg, eitt nu Føroya Sparikassa og Føroya Lívstrygging.

Heimasíðugerðin hjá Reproz hevur higartil komið av sær sjálvum. Virkið hevur ikki gjørt stórvegis søluarbeiðið av skipanini. Allan Dalsgarð og Niels Arge Galán vístu skipanina fram, og teir søgdu: at hetta nú skuldi broytast. Teir hildu, at teir høvdu eina frálíka skipan, og at hon væl kundi kappast við hinar skipanirnar á føroyska marknaðinum, bæði í prísi og góðsku.

Skipanin hevur fyrst og fremst styrki í sínari brúkaravinarligheit. Sjálvur brúkaraparturin er sera lættur at hava við at gera. Eisini hevur skipanin myndaviðger innbygda, og hetta er ikki vanligt í øðrum heimasíðuskipanum. Skipanin er uppbygd í partar, og til ber at keypa eina størri ella minnið skipan alt eftir tørvinum hjá virkinum.

Dynamic Web er forritað av donsku fyritøkuni Dynamic Systems. Fyritøkan hevur 25 forritarar í starvi og hevur higartil selt skipanir til 1200 fyritøkur og virkið kring heimin. Eisini í so fjarskotnum londum sum Japan.

Tá framløgan var av, var lutakast millum lutakararnar um eina heimasíðuskipan. Hepni vinnarin varð Føroya Shell. Umboðið hjá Føroya Shell helt fyri, at nú kundu teir næstan ikki lata verða við, at betra um heimasíðuna hjá sær.

